# Í 96 TÍMAR

**Bilførarin var nú bookaður uttanfyri Sjómansheimið allar ólavsøkudagarnar**


*Hetta var taxabilurin, sum Manni Waag Høgnesen koyrdi tiltikna ólavsøkutúrin í 1972*


*Teir hildu til á Sjómansheiminum í Havn*


*Manni Waag Høgnesen*


*Sjómenninir úr Hvannasundi fóru tvørtur um sundið í hesum bátinum, og so stóð Manni fyri teimum í Norðdepli*

at teir virkuliga vilja hava meg við til Havnar, og at bilurin skal við, sigur Manni. Tann dýra lastin er jú í bilinum. Men hóast eg hevði koyrt rættuliga skjótt, so var Ternan farin frá bryggjuni og hvannasundsmenninir síggja nú at ólavsøkan var í vanda.

Manni sigur, at hann helt hondini á floytuni allan vegin oman á bryggjuna, har Ternan hevði ligið. Í dag hevði hetta neyvan hjálpt, men skiparin á Ternuni bakkaði inn aftur, og so bleiv hvíti franski Chrysler bilurin lossaður umborð.

Komnir í land í Leirvík beiv koyrt við ferð til bryggjuna á Toftum, tí nú ráddi um at náa strandfaraskipið Trónd, sum heldur ikki tók so nógvar bilar. Eysturoyartunnilin og brúgvin um Streymin vóru ikki komin, so Tróndur var einasta farleið, at koma til Havnar. Við fleiri yvirhálingum, men við hampuligari koyring kom franski Chrysler bilurin hjá Manna fram í evstu løtu á Toftakai. Hann var seinasti bilur umborð á Trónd.

Hvannasundsmennirnir vóru glaðir. Eg veit ikki um eg var so glaður, tí hesin túrurin var so avgjørt ikki tað, eg hevði lagt til rættis, tá eg fór til Norðdepils fyri fáum tímum síðan. Umborð á Tróndi var stúgvandi fult av bilum og fólki. Komin til Havnar gekk leiðin beinleiðis omaná Sjómansheimið, at biðja um verilsir til allar ólavsøkudagarnar – eisini til bilføraran, sigur Manni.

Á veg suður fekk eg tað fatan, at eg bara skuldi koma við til Havnar og lessa ólavsøkulastina í viðførisrúminum av, og so skuldi eg norður aftur dagin eftir, men nei, bilførarin var nú bookaður á Sjómansheiminum allar ólavsøkudagarnar.

Hvannasundsmenninir hildu nú ólavsøku við manér. Sum flest øll vita, so var Sjómansheimið tá eitt rúsfrítt hotell, og ikki var loyvt at hava spiritus inn við. Tann franski Chrysler bilurin var nú álitið, tí hann var spruttgoymsla alla ólavsøkuna.

## Eldur í Sjómansheiminum

Manni minnist eina stuttliga hending á Sjómansheiminum tann 29. juli um morgunin. Hvannasundsmenninir, sum svóvu út móti vegnum, vaknaðu við bláum blunki og sirenu. Fullisjúkir og illa svøvntir hyggja teir út gjøgnum vindeyga og síggja stóra mannamúgvu og fleiri brandbilar. Eldur var í Sjómansheiminum.

Mannir flennir, tí tað einasta hvannasundsmenninir gjørdu, var at koma niður á næstu hædd og banka uppá mína hurð og spyrja um eg var á lívi, og hvar bilurin var, tí tað var jú eldur í.

Eg svaraði teimum, sum stóðu úti í gongini og róptu at her stóð væl til, og at bilurin stóð langt burtur frá Sjómansheiminum. Eg lat meg kvikliga í og fór út á vegin. Tað var nokk ikki eldur í, men heldur nøgvur roykur, sum eg skilti tað aftaná, sigur Manni.

Tá mannamúgvan og brandbilarnir vóru farin, fór eg at kanna hvar hvannasundsmenninir vóru. Uttan fyri vóru teir ikki. So fór eg inn á Sjómansheimið. Jú, teir lógu í fasta svøvni á sínum kømurum, sigur Manni. Teir høvdu bara tryggjað sær, at bilførarin var á lívi, og at spruttgoymslan var í tryggum hondum, langt burtur frá Sjómansheiminum, og so løgdu teir seg aftur, sigur Manni við einum smíli.

Tann 30. juli út á dagin var spruttgoymslan uppi. Tá kom ein av hvannasundsmonnunum til mín og segði, at mín uppgáva var loyst, og eg kundi fara norður aftur. Teir blivu eftir í Havn og hildu fram í fleiri dagar saman við vinmonnum í Havn.

Soleiðis endaði tann 96 tíma langi ólavsøkutúrin 1972 hjá Manna Waag Høgnesen.

birgir@sosialurin.fo